VIÐMERKINGAR

# Kommunalpolitikar-ar snorksova

**Onkur vaknaði við kaldan dreym,tá tað vísti seg, at landið ikki vil gjalda sín part av barnaverndar-økinum**



**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*

Tað er okkurt heilt galið, tá ið ein vanligur kommunal-politikari kann góðtaka, at tey, sum hava tí minstu inntøkuna, skulu bløða fyri, at landið blakar ábyrgdina frá sær og at nakrir borgarstjórar, ið sýnast at verða fongdir við stórlætisørskapi, vilja yvirtaka bæði eitt og annað frá landinum, uttan bindandi avtalur.

**Ein fíggjarlig bumba**

Vit mugu vóna, at fólkavaldu kommunalpolitikarar, sum hava ligið í fasta svøvni, eru greiðir yvir, at landið hevur og ætlar, at turka hesar útreiðslur av uppá kommunurnar.

- Barnavernd
- Eldraøki
- Botnfrádrátt í kommunuskatti
- FAS
- Bókasøvn
- Skúlabarnaflutning
- Næmingagjaldi í musikkskúlunum
- O.s.v

Hetta er ein fíggjarlig bumba, ið kommunurnar fara at merkja svian av, tá ið hon brestur. At løgtings- og landsstýrismenn siga, at pengar fylgja við, er føgur orð uttan innihald, tað er jú ein almennur sannleiki.

**Hvør skal gjalda**

Sjálvsagt skal borgarin gjalda, ætlanin er at kommunuskatturin skal hækka, og við núverandi skattaskipan er tað Palleba og Marsanna, sum tjena minst, ið verða harðast rakt. Tað liggur í kortinum, at hvørja fer útreiðslurnar hækka so hækkar kommunuskatturin og tey lágløntu merkja svian. Vónandi sita arbeiðarafeløgini ikki hendur í favn.

At vanligir kommunalpolitikarar lata hesar omanfyri nevndu borgarstjórar, draga seg eftir hárinum og koma kommunurnar í fíggjarligt óføri, er óhoyrt. Tí vóni eg, at tey vakna og gera vart við seg, tí tann fíggjarligi avtalan millum land og kommunu er yvirhøvur ikki komin uppá pláss.

**Noreg, ríkasta land í verðini**

***Tað er eingin bindandi avtala millum land og kommunur um fíggjarliga leistin og er tað ein dáragerð móti borgarunum í kommununum, at yvirtaka nakað sum helst, áðrenn ein 110 prosent greið avtala er komin upp á pláss.***

At landið nú sigur, at 60 milliónir í skattalætta skal verða endurgjald fyri yvirtøkur er at fullspotta borgaran, og halda, at hann er býttur.

Hyggi at Noreg, ríkasta land í verðini og kommunurnar har hava ikki ráð, at geva nøktandi tilboð til eldraøki, tí landið vil ikki stuðla nóg nógv.

# Hvussu fer landsstýrismaðurin at tryggja førleikan á landssjúkrahúsinum nú serlæknar verða sagdir úr starv

**Annita á Fríðriksmørk**
*framsøgufólk hjá Tjóðveldisflokkinum í Heilsumálum*



Tá eg ikki kenni orsøkina til uppsøgnina av leiðandi yvirlæknanum, fari eg ikki at leggja meg útí, um tað var rætt ella skeivt at siga hann úr starvi. Tað, sum er komið alment fram, kann neyvan verða grundarlag fyri uppsøgn, og er møguliga heldur ikki allur sannleikin? Vit vita ikki. Vit lesa. Vit lurta. Og vit gita…

Heldur landsstýrismaðurin, at tað sum leiðandi yvirlæknina hevur gjørt ikki kundi forsvarast við eini nøs ella við eini ávaring, men bara við eini uppsøgn, so hevur evsti myndugleiki tala, og harvið verður tað!

Men tá ið landsstýrismaðurin í Heilsumálum ikki vil gera nakra viðmerking til málið, við tí grundgeving, at talan er um eitt persónsmál, so er hetta ein sannleiki við motifikatiónum. At siga ein leiðandi yvirlækna úr starvi, er ikki bara eitt persónsmál. Slík atgerð nervar fyrst og fremst alt landssjúkrahúsið, og loypir hvøkk á øll tey, sum varða av hesum øki. Fyri okkum, sum uttanfyri standa er talan í veruleikanum líka nógv um eitt heilsumál sum eitt persónsmál. Og tað er tað heilsumálsliga, sum fær meg at taka pennin. Hetta fyri at reisa spurningin, um førleikin á landssjúkrahúsinum ikki hevur fingið ein undir vangan?

Og táið eg seti spurning við førleikan, so er tað tí, at er tað nakað, vit ikki hava ov nógv av í Føroyum, so eru tað serfrøðingar innan læknavísind. Og er tað nakað sum er grundarlagið undir okkara vælferðarskipan, so er tað eitt vælvirkandi heilsuverk, sum m.a. skal verða innbjóðandi fyri serfrøðingar at koma til. Tí vóni eg, at ovasti politiski myndugleikin hevur hugsað plan B, tá ið slík álvarslig stig verða tikin. Og góðtikin! Og plan B má m.a. verða at tryggja, at førleikin sum leiðandi yvirlæknin á landssjúkrahúsinum Jóhan Petur Davidsen hevur, verður tryggjaður á landssjúkrahúsinum.

Spurningurin til Hans Paula Strøm er tí, um hann hevur tryggjað, at landssjúkrahúsið varðveitir førleikan innan økið hjá uppsagda yvirlæknanum, nú hesin er sagdur úr starvið?

**P.S.** Sum skilst á Útvarpið Føroya og á føroysku bløðunum, so er orsøkin til uppsagnina, at JPD hevur lagt sjúklingar undir skurð, meðan verkfallið var. Skurðviðgerðir, sum leiðslan ikki helt verða bráðneyðugar, og sum hon tí hevði útsett til verkfallið var av, men tó uttan at siga JPD frá.

Er hetta so, kann eg ikki lata verða við at vísa á tann paradoksala hugburðin, sum valdar. Sami landsstýrismaður, sum undir lógligum verkfallli mælir til at lóggeva part av verkfallsrakta økinum til arbeiðis, sigur í sama mánaði leiðandi yvirlækna úr starvi, tí hesin um somu tíð var til arbeiðis og legði sjúklingar undir skurð.

Er hetta so, verður í øllum førum skorið út í papp, hvussu nógv týdningarmiklari samgongan heldur, at Smyril er enn Landssjúkrahúsið.

# Høgni Hoydal sum ummælari av limablaði Sambandsfloksins

**Helgi Abrahamsen**



Góði Høgni Hoydal

Eg síggi, at tú í bløðunum í dag leggur eftir limablaðnum, sum Sambandsflokkurin hevur sent út í hesi vikuni. Tú vísir til eina grein, sum viðgerð ætlaðu fólkaatkvøðuna í 2001, og kallar tað sum har stendur fyri ósannindi.

Greinin í limablaðnum vísti annars til tína grein í bløðunum tann 16. september í ár, har tú skrivar soleiðis: "*Tað var í hesum uppskoti, at blokkstuðulsniðurskurðurin varð settur til 300 - 400 mió. kr. og gjørt varð av at yvirtaka alt, so ONKI FÍGGJARLIGT OG UMSITINGARLIGT TRÝST SKULDI VERA Á FÓLKI, TÁ TEY Á FÓLKAATKVØÐU SKULU TAKA STØÐU TIL AT SKIPA FØROYAR SUM SJÁLVSTØÐUGT RÍKI.*"

Nú kallar tú hetta fyri ósannindi og vísir á, at í uppskotinum, sum skuldi til fólkaatkvøðu, varð týðiliga greitt frá, hvat hetta fór at kosta og hvussu nógv blokkstuðulin minkaði hvørt árið.

Eg fari tí at spyrja teg, hvat tú so meinti við, tá tú tann 16. september skrivaði, at einki fíggjarligt trýst skuldi vera á teimum føroyingum, sum fóru á fólkaatkvøðu? - Hví var tað so umráðandi, at fólkið ikki skuldi merkja tað fíggjarliga trýstið? Og hvussu ber tað til, at yvirtøkurnar, sum vórðu framdar í 2001, kostaðu eina upphædd, sum júst svaraði til gjaldførisavlopið hjá landskassanum (tað vil siga, at tað bleiv akkurát ikki neyðugt at leggja nakað eykagjald á fólkið, sum skuldi á fólkaatkvøðu)? Og hvar í uppskotinum finni eg ta týðuligu frágreiðingina um, hvat uppskotið fór at kosta?

**PS!** Hvar bleiv hasin veðrurin av?

# Klaksvíkar HF-skeið flytast ella samskipan á staðnum?

**Eyðgunn Samuelsen**



Nú er komið fram, at landsstýrismaðurin í Mentamálum ætlar at leggja HF-skeiðini í Eysturoy og Klaksvík saman. Grundgevingin er, at nú koyrandi verður ímillum Klaksvík og Eysturoy má samskipast, so tilboðini eru so bílig sum til ber.

Sjálvandi skal tað almenna altíð rekast so bíligt og væl sum til ber. Hetta kann gerast á fleiri mátar, hvat við at kanna, um tað ikki kann gerast bæði bíligari og ikki minst betur við at samskipa HF við skúlarnir, ið eru á staðnum - í Klaksvík?

Sum er, er Klaksvíkar HF skeið tað HF skeiðið, ið hevur virkað mest sambært sínum endamáli, nevniliga at vera ein eftirútbúgvingarmøguleiki fyri tilkomin fólk, serliga ungar kvinnur við børnum. Um HF-skeiðið verður flutt, kann ein ikki vænta, at hesin bólkur í sama mun fer at hava møguleika at útbúgva seg. So vítt eg veit eru væl fleiri næmingar á HF-skeiðnum í Klaksvík enn í Eysturoy, og tað kemur óivað av, at í Eysturoy eru fleiri onnur tilboð, bæði studenta- og handilsskúli. Eisini búgva flestu lærarnir, sum í dag undirvísa á Klaksvíkar HF-skeiði í Klaksvík, verður skeiðið flutt, skulu hesir hava løn fyri at ferðast til arbeiðis.

Vil landstýrismaðurin avtaka møguleikan hjá tilkomnum kvinnum at útbúgva seg samstundis sum visión 2015 setir sær sum mál, at øll skulu hava eina miðnámsútbúgving ella líknandi? Hví skal ein broyta tað, ið virkar væl.

Klaksvíkin hevur fleiri vælvirkandi skúlar, ið liggja »spjaddir« runt í Klaksvík og tí, hvør í sínum lagi eru smáar eindir, ið lættliga kunnu rationaliserast til Eysturoy og Havnar. Skal útbúgvingarpolitikkurin við Visión 2015 eisini galda fyri Norðoyggjar, so eigur landsstýrismaðurin at hyggja at skúlunum í Klaksvík sum eini heild og kanna, hvussu hesir saman kunnu virka bíligari og betur í Klaksvík. Rationaliseringar kunnu, sum øllum kunnugt, eisini gerast á staðnum.

Latið okkum varðveita eitt fjøltáttað útbúgvingartilboð til øll í Føroyum - eisini í Norðoyggjum!